## Matur skal draga ferðafólk



Ein nýggj sjónvarpsrøð um grønlendskan mat skal fáa útlendingar at velja sær Grønland sum ferðamál. Røðin, sum hevur fingið heitið "A taste of Greenland", er í seks pørtum, og til at hjálpa sær hava grønlendingar fingið nýsælendska meistarakokkin Chris Coubrough, ið hevur lutin sum vertur í sendiroðini. Tað eru grønlendska ferðavinnan, vinnufeløg, útbúgvingarstovnar, ymsir felagsskapir og onnur, sum hava tikið stig til sendirøðina, og sambært Sermitsiaq eru stigtakararnir væl væl nøgdir við úrslitið. Teir ivast ikki í, at røðin kann fáa útlendingar at fáa ans fyri grønlendskum mati og landinum sum heild.

## Danske Bank risatap í Írlandi

Í dag man leiðslan í Danske Bank iðra seg um, at hon valdi at keypa tveir írskar bankar fyri fýra árum síðani, tí úrslitið bleiv ikki tað, sum bankin væntaði. Í 2004 keypti Danske Bank írska bankan National Irish Bank og tann norðurírska Northern Bank fyri 10,4 milliardir krónur fyri at fáa lut í tí stóra búskaparvøkstrinum í Írlandi. Men síðani er framgongdin steðgað og vorðin til afturgongd, og tað hevur sambært Berlingske Tidende havt við sær, at teir báðir írsku bankarnir hava mist næstan alt sít virði.

# Oyggjaleiðir missa túrar



*Skulu Strandfaraskip Landsins halda játtanina komandi ár, so metir stovnurin, at 34 túrar hjá oyggjaleiðum um vikuna skulu sparast og 30 um summarið*

**Skulu Strandfaraskip Landsins halda seg innanfyri karmin sum fíggjarlógin leggur upp til, so missa nógvar oyggjaleiðir túrar komandi ár**

STRANDFERÐSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Suðuroyingar missa 4 túrar av 34 um veturin, men onki um summarið, sandoyingar missa 14 túrar av 122 alt árið, kalsoyingar missa 8 túrar av 92, nólsoyingar missa 8 túrar av 92 og øll skulu gjalda ein fjórðing afturat fyri at koma í ymisku oyggjarnar.

Hetta leggja Strandfaraskip Landsins upp til í teirra hoyringsssvari til fíggjarlógaruppskotið 2010, har Strandferðslan greiðir frá, hvussu hon kann gera fyri at liva upp til treytirnar, sum eru álagdar av landsstýrinum.

Til samans verður í 2010 álagt Strandfaraskipum Landsins at spara umleið 13 milliónir krónur, tí samlaða játtanin hjá Strandferðsluni er skorin við 700.000 krónum, samstundis, sum tænastan til ávísar leiðir skal økjast.

Tænasturnar, sum skulu økjast eru at bilferja skal sigla til Nólsoyar, umframt at Svínoyar- og Fugloyarleiðin skal hava eina betri tænastu.

Hyggur Strandferðslan at oljuprísum, so var í 2009 mett við 50 oyrum ov lítið fyri liturin, so tað í veruleikanum vóru 5 milliónir krónur at nýta.

Afturat øllum hesum koma lønarframskrivingar á meira enn eina millión krónur.

Út frá hesum heldur Strandferðslan, at besta loysnin er at minka minst nýttu túrarnar á oyggjaleiðum og at hækka prísirnar har, sum tó ikki fara upp um kostnaðin, sum hann var í 2007, tá prísurin varð settur niður.

## Suðuroyingar mótmæla skerjingum

Borgarstjórarnir í Suðuroy og Suðuroyar Ferðavinnufelag mótmæla ætlanunum hjá Strandfaraskipum Landsins at skerja túratalið hjá Smyrli til Suðuroyar.

Í ætlanunum hjá Strandferðsluni verður lagt upp til, at Smyril fær fýra túrar minni um veturin, men heldur fast við summartúratalið.

Smyril fer í løtuni 17 ferðir um vikuna av Tvøroyri, og hetta tal verður ætlandi skert soleiðis, at Smyril siglir av Tvøroyri 14 ferðir um vikuna um veturin.

- Borgarstjórarnir í oynni, saman við nevndini fyri Suðuroyar Ferðavinnufelag, vilja tí staðiliga heita á landsstýrismannin í vinnumálum at gera sítt ítarsta til, at vit kunnu varðveita í minsta lagi verandi ferðatíttleika við meginøkið, siga tey í skrivi í dag.

**- eij**

## Johan Dahl kannar málið



*Johan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, heldur, at sparingarnar helst kunnu vera minni, tí tað sær út til, at hann kanska fær meira játtan*

Løgmaður hevur sagt, at tað kanska ber til at hækka karmin, og eg fari at kanna, um tað ikki ber til, at syrgja fyri, at skerjingarnar vera eitt vet minni.

Men hann viðurkennir, at samfelagið koyrir tungt í løtuni, og tí mugu sparingar gerast í rakstrinum á nógvum økjum.

- Mann má síggja í eyguni, at øll mugu gera sítt. Harímillum verður neyðugt við sparingum hjá Strandfarskipum landsins, men tingini glíða aðrastaðni, og tí fari eg at kann, um hon kann sleppa eitt sindur lættar, sigur Johan Dahl.

- Tað kann ikki bera til, at nakrir sektorar fáa í posa og sekk og onnur mugu bløða, sigur hann.

Hann vísir tó á, at sparingarnar eru gjørdar so skynsamar sum gjørligt.

- Vit síggja, at summarsiglingin á Suðuroyarleiðini ikki verður skerd og tað verður á vetrarhálvuni, at skerjingar verða gjørdar, sigur Johan Dahl.

Viðvíkjandi mótmælunum hjá borgarstjórunum á Suðuroyggjunum, sigur Johan Dahl, at teir mugu skilja, at sparingar vera gjørdar, men hann fer at kanna, um tað ikki ber til at gera okkurt.

**-eij**

## - Jóhan Dahl grevur landsveg av

Allir borgarstjórarnir í Sandoy heitaá Jóhan Dahl, landsstýrismann við Vinnumálum, at lata vera við at skerja túratalið hjá Teistanum komandi ár.

- Hetta er tað sama sum at grava ein landsveg av, siga borgarstjórarnir í skrivi í dag.

Teir leggja afturat, at Teistin er teirra forlongdi armur til miðstaðarøkið, at umstøðurnar eru ringar sum er og hetta, við at skerja teir síðstu túrarnar og túrar sum heild, kann verða banahøggið til Sandoynna.

Sum ætlanin hjá Strandferðsluni er í dag við túrunum til Sandoynna komandi ár, tí sparingar skulu gerast, verða 14 túrar færri um vikuna.

Tað vil siga, at verður ætlanin veruleiki, so verða 108 túrar heldur enn 122 um Skopunarfjørð um vikuna.

**- eij**




Køkshjálp

Effo søkir eftir køkshjálp, 4 tímar um dagin, frá kl. 10.00-14.00, tó mikudag frá kl. 08.00-14.00. Starvið fevnir um innkeyp og matgerð í køkinum á høvuðsskrivsstovuni á Óðinshædd í Tórshavn. Harumframt skal viðkomandi hjálpa til í sambandi við tiltøk og fundir.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið er tímalønt.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við Sverra Kallsberg á tel 34 35 21 ella við at senda teldupost til ska@effo.fo. Starvið verður at seta skjótast tilber.

effo føroya orkufelag

Pf. Effo Postboks 3098 110 Tórshavn
Tel +298 34 35 00 Fax +298 34 35 01 www.effo.fo